## Ferdinand er ivasamur

Rio Ferdinand mátti fara av vøllinum tá Manchester United vitjaðu á Riverside Leikvøllinum í Middlesbrough sunnudagin. Nemanja Vidic er eisini á skaðalistanum, og hann verður ikki tøkur aftur fyrr enn um mánaðarskiftið. Mangla bæði Ferdinand og Vidic kemur verjan hjá Manchester United-verjan undir eitt ræðuligt trýst. - Vónandi er skaðin hjá Rio ikki so álvarsamur. Hann tók seg til beinið, og um hann hevði verið verandi á vøllinum høvdu vit ikki fingið tað maksimala burtur úr honum. Eg vóni, at vit kunnu hava hann kláran til heimadystin ímóti Roma, segði United-venjarnin, Alex Ferguson í gjár. Mikukvøldið spælir Manchester United seinnu fjórðingsfinaluna í Champions League-kappingini ímóti Roma. United vann útidystin 2-0.



## Vit skora á Anfield

Arsenal má skora í seinnu fjórðingsfinaluni ímóti Liverpool á Anfield Road í kvøld, um teir skulu vinna seg í Champions League-hálvfinaluna. Danski Arsenal-leikarin Nicklas Bendtner hevur góðar vónir: - Tað hendir ikki ofta, at vit í Arsenal spæla 0-0. Liverpool hevur sjálvandi lagt ein taktikk, og vit hava lagt okkara. Men vit megna altíð at skora, og vit koma til okkara málmøguleikar. Ì fyrru fjórðingsfinaluni var Bendtner so óheppin, at hann bjargaði einum skoti hjá liðfelagnum, Cesc Fabregas á málstrikuni hjá Liverpool. Bendtner gjørdi tó skaðan góðan aftur, tá hann skoraði ímóti Liverpool í Premier League-dystinum, sum var leiktur leygardagin.

# SÍ tók tað mesta



*Ársins spælarar komu bæði úr SÍ. Karin Mikkelsen og Jóhan Petur á Stongum. Eisini vann Karin heitið sum ársins álopsspælari, meðan Jóhan Petur gjørdist ársins verjuspælari hjá monnum og ársins venjari hjá kvinnum*



*Suffía Purkhús úr Mjølnir gjørdist ársins*



*Hjá monnum varð Jan Ellingsgaard kosin sum ársins stjørnuskot*

**Av teimum 14 steypunum, sum vórðu latin á gallakvøldinum hjá flogbóltinum um vikuskiftið, átti SÍ tey níggju**

**FLOGBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Karin Mikkelsen og Jóhan Petur á Stongum áttu størstu klappini, tá tey fóru upp á pallin eftir steypunum sum ársins spælarar í føroysku flogbóltskappingini í júst lidna kappingarári.

Ikki óvæntað varð tað SÍ, sum streyk avstað við tí mesta, tá gallakvøldið varð hildið í HB-húsinum leygarkvøldið. SÍ vann landskappingina hjá bæði kvinnum og monnum, og hartil vunnu menninir hjá SÍ eisini steypakappingina í ár. Og tá avtornaði, vóru tað bert fimm spælarar, ið megnaðu at sníkja seg undan dominansinum frá SÍ.

## TEY BESTU

**Ársins áleypari**
Kvinnur Karin Mikkelsen, SÍ
Menn Jón Nielsen, SÍ

**Ársins blokkur**
Kvinnur Sóleyg Poulsen, KÍF
Menn Suni Juul Petersen, Fleyr

**Ársins hevari**
Kvinnur Annika á Stongum, SÍ
Menn Ólavur Jensen, SÍ

**Ársins stjørnuskot**
Kvinnur Suffía Purkhús, Mjølnir
Menn Jan Ellingsgaard, ÍF

**Ársins verjuleikari**
Kvinnur Margit Joensen, Mjølnir
Menn Jóhan Petur á Stongum, SÍ

**Ársins venjari**
Kvinnur Jóhan Petur á Stongum, SÍ
Menn Ragnar í Haraldsstovu, SÍ

**Ársins leikari**
Kvinnur Karin Mikkelsen, SÍ
Menn Jóhan Petur á Stongum, SÍ



*Margin Joensen úr Mjølnir hevur í fleiri ár verið føst á libero-plássinum á landsliðnum. Og aftur í ár varð hon kosin ársins verjuspælari*



*Meistaraliðini áttu eisini bestu hevararnar. Tey vóru Annika á Stongum og Ólavur Jensen*